# Bilar

Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo






Soleiðis sær út inni á eini battaríkskiftistøð

# Battarí-skiftistøðir í Danmark

Eitt tekin um at elbilarnir nærkast í stórum, er at battaríkskiftistøðir nú verða settar upp. Ein battaríkskiftistøð verður eftir ætlan sett upp hjá Skandinavisk Transport Center í danska býnum Køge.

Skiftistøðin í Køge verður ein av teimum fyrstu hjá Better Place í Evropa. Tað er fyritøkan Better Place Danmark, sum stendur fyri verkætlanini.




Battaríkskiftistøð hjá Better Place í Tokyo



Terkel Spangsbo og Suzanne Zabava frá Motormagasinet

Mynd: Jens Kristian Vang

# Donsk bilfólk til Føroya

Í farnu viku vitjaðu Suzanne Zabava, sølustjóri, og Terkel Spangsbo, journalistur á danska fakbláðnum Motormagasinet í Føroyum. Vitjanin var gjørd í sambandi við, at Motormagasinet fyrireikar ein túr til Føroya fyri fólk frá donsku bilbransjuni í september í ár.

Hóskvøldið 13. januar høvdu Suzanne Zabava og Terkel Spangsbo fund í Miðlahúsinum við kontaktpersónar í Føroyum í sambandi við vitjanina, sum eftir ætlan verður frá 16. til 21. september.

Hósdagin 20. januar kl. 16.10

Í sendingini verður vitjað hjá handilsfyritøkuni Blika í Akranesgøtu í Havn, har samrøður eru við stjóran Beinir Kristiansen og við sølufólkini Gisla Poulsen, Rúna Nielsen, Jógvan Nielsen og Regin Bláhamar.

Eisini verður vitjað hjá Bygma Balslev í Hoyvík, sum letur tveir nýggjar handlar upp leygardagin 22. januar. Í hesum sambandi eru samrøður við Sólbjørn Thomsen um nýggju gólvdeildina, og við Áka Mortensen um HVS-handilin HITI, sum nú er partur av Bygma Balslev.

Gisli Poulsen



Sólbjørn Thomsen





Áki Mortensen

2

Vinnu- & bílradío á Rás